

FØÐINGAR

6. juni fingu *Katrin & Marner Køtlum*, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4390 gr.

14. juni fingu *Brynhild & Tórður Poulsen*, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 5040 gr.

16. juni fingu *Marta & Eyðun á Lakjuni*, Fuglafirði, ein son. hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

17. juni fingu *Anna Sofía & Óli Andreas Kristiansen*, Eiði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3650 gr.

18. juni fingu *Ása Thomsen & Niels Nielsen*, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3185 gr.

19. juni fingu *Jana & Eyðfinn Nielsen, Saltangará, ein son*. Hann var 51 cm langur og vigaði 3750 gr.

20. juni fingu *Vivian Dahl & Regin Joensen*, Keypmannahavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4050 gr.



ANDLÁT

13. juni
Julia Larsen, Tvøroyri, 92 ára gomul.
Julia Joensen, búsitandi í Søborg, dóttir Berthu og Sigurd Joensen, Fuglafirði, 49 ára gomul.
Leivur Ánadal, ættaður úr Fuglafirði, búsitandi í Vestnes í Noregi, 66 ára gamal.

14. juni
Andreas Poulsen, Eiði, vanliga nevndur Andreas hjá Jens, 96 ára gamal.

16. juni
Maria Jacobsen, fødd Petersen, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Sumba, 49 ára gomul.

18. juni
Inga Mørkøre, Klaksvík, 75 ára gomul.

19. juni
Jona Lognes, fødd Jensen, ættað av Tvøroyri, 77 ára gomul.
Jacob Pauli Hammershøj, Víkarbyrgi, 84 ára gamal.



KIRKJUR & SAMKOMUR

Gudstænastur 3. sunnudag eftir Trinitatis

Vesturkirkjan: Bergur D. Joensen, altargongd
Havnar kirkja: Sonja Klein
Nólsoy: Høgni Poulsen
Klaksvíkar Sjúkrahús: Henning Bøgesvang kl. 10
Norðoya Røktarheim: Henning Bøgesvang kl. 14.30
Christianskirkjan: Erland Beder kl. 11
Hattarvík: Niels Pauli Danielsen kl. 10
Kirkja: Niels Pauli Danielsen kl. 12
Kollafjørður: Uni Næs kl. 11
Vestmanna: Uni Næs kl. 17, familjugudstænasta
Hósvík: Marjun Bæk kl. 11
Skála: Jógvan Friðriksson kl. 11, altargongd. Talvan gongur til frama fyri Leguhúsið í Nesvík
Gøta: Peter O. K. Olofson kl. 11, altargongd
Funningsfjørður: Peter O. K. Olofson kl. 16, altargongd
Mykines: Hans J. Joensen, biskupur
Gjógv: Emil Olsen kl. 12, altargongd. Talvan gongur fyri Guds orðs boðan
Eiði: Emil Olsen kl. 16, barnagudstænasta
Sandur: Jákup Reinert Hansen kl. 12, altargongd
Vágur: Heri Joensen kl. 11
Leiti: Heri Joensen kl. 12.15
Tvøroyri: P. M. Rasmussen

KFUK, Tórshavn

Mánadagin kl. 15: Eldrasamkoman v/ Emili Olsen, presti. Evni: Kirkjurnar í søknini.

Meinigheitshúsið, Tórshavn

Sunnukvøldið 23. juni kl. 18: Møti.
Týskvøldið 25. juni kl. 20: Bíbliutími um Aps. 12 v/ Bergur D. Joensen.

Frelsunarherurin, Tórshavn

Leygardagin kl. 11: Viðrar, verður útimøti í gongugøtuni.
Sunnudagin kl. 11 og kl. 18: Møti. Ann Merethe og Erlingur Nielson tala.

Nardussamkoman, Tórshavn

Sunnukvøldið kl. 18 verður evangeliskt møti í Deyvahúsinum »Effata«, Íslandsvegur 10.
Mikukvøldið kl. 20 verður møti í heimunum.

Rhema, Tórshavn

Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti.
Mikukvøldið kl. 20: Møti.

Frelsunarherurin, Vági

Sunnukvøldið kl. 18: Møti.

Samkoman Sion, Vágur

Morgunmøti.
Sunnukvøld kl. 18.00: Evangeliskur fundur.
Mánakvøld kl. 20.00: Bønarfundur.
Hóskvøld kl. 20.30: Bønar-fundur.
Forbønartænastan svarar á tlf. 73941 bæði kvøldini meðan bønarfundur er.
Telefonandaktin: 73777.

Norðskáli

Møti verður sunnukvøldið kl. 19.00 við Niels Jacob Nielsen, trúboðara.

Missiónshúsið í Hvalvík

Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 19: Sangmøti.

Kvívík

Møti verður í Glæmuni sunnukvøldið kl. 19.00 við Regini Høgnesen. Innsavnan.

Keldan í Skálafirði

Í kvøld kl. 20: Møti v/ Jens Vestergaard og øðr-um.
Sunnukvøldið kl. 19: Møti v/ Jens Vestergaard ogøðrum. Luttøka av Keldukórinum.

Lívsins Orð

Barnamøti hósdag kl. 17.30 í Stokkastovuni. Øll børn eru vælkomin.
Evangeliskt møti hóskvøld kl. 20 í Stokkastovuni.
Møti sunnumorgun kl. 10.30 í Stokkastovuni.
Øll eru vælkomin.

Kristnastova

Birmavej 36, København S, tlf. 31 55 18 09 / fax 31 58 61 49.
Friggjakvøldið kl. 20 er kristiligur fundur. Sunnumorgunin kl. 11 er samkomufundur við breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 12.30.

Evangeliska Røddin

Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.



DAGSINS TEKSTUR

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni, 9. kap. 1.–18 v.

Men Saul, sum enn frøysti hóttir og manndráp móti lærusveinum Harrans, fór til høvuðsprestin og bað hann um bræv til Damaskus, til samkomuhúsið har, fyri at hann, um hann hitti nøkur, sum hoyrdu til »vegin«, menn ella konur, kundi føra tey í bondum til Jerúsalem. Men tá ið hann á ferðini var komin nær til Damaskus, ljómaði knappliga eitt ljós av himni um hann; og hann fell til jarðar og hoyrdi eina rødd siga við seg: »Saul, Saul, hví søkir tú at mær?« Men hann segði. »Hvør ert tú, Harri?« Og hann svaraði: »Eg eri Jesus, sum tú søkir at. Men satt upp og far inn í staðin, og har skal tær verða sagt, hvat tú eigur at gera«. Men menninir, sum vóru í ferðini við honum, stóðu málleysir; teir hoyrdu fullvæl røddina, men sóu ongan. Og Saul reisist upp av jørðini; men tá ið hann læt eyguni upp, sá hann einki, og teir leiddu hann við hondunum og fóru við honum inn í Damaskus. Og tríggjar dagar sá hann einki, og hann hvørki át ella drakk. Men í Damaskus var ein lærusveinur, sum æt Ánanias, og Harrin segði við hann í eini sjón. »Ánanias!« Og hann segði: »Sí, her eri eg, Harri!« Men Harrin segði við hann: »Statt upp og far í ta gøtuna, sum kallast hin beina, og spyr í húsinum hjá Judasi eftir einum manni frá Tarsus, sum eitur Saul; tí, sí, hann biður. Og hann hevur í eini sjón sæð ein mann, sum eitur Ánanias, koma til sín og leggja hendurnar á seg, so at hann kundi fáa sjónina aftur!«

Men Ánanias svaraði: »Harri, eg havi hoyrt av mongum um henda mann, hvussu nógv ilt hann hevur gjørt tínum heilagu í Jerúsalem. Og her hevur hann í umboði frá høvuðsprestunum at binda øll tey, sum ákalla navn títt«. Men Harrin segði við hann: »Far tú, tí at hesin maður er mær eitt útvalt ílát til at bera navn mitt fram fyri heidningar og kongar og Ísraels børn; tí at eg vil sýna honum, hvussu mikið hann eigur at líða fyri navn míns sakir«. Og Ánanias fór tá avstað og kom inn í húsið og legði hendurnar á hann og segði. »Saul, bróðir, Harrin hevur sent meg, Jesus, tann sum birtist fyri tær á veginum, sum tú komst, til tess at tú skalt fáa sjón tína aftur og verða fyltur við heilagum anda«. Og alt fyri eitt fell tað eins og skøl frá eygum hansara, og hann fekk sjónina aftur; og hann stóð upp og varð doyptur.

Hetta heilaga evangelið skrivar Lukas evangelistur, 15. kap. 11. v. og út.

Og [Jesus] segði: »Ein maður átti tveir synir. Og hin yngri teirra segði við faðirin: »Faðir, gev mær tann partin av ognini, sum mær líknast«. Og hann býtti góðsið millum teirra. Og ikki mangar dagar eftir hetta savnaði hin yngri sonurin alt saman og fór burtur í eitt fjarlagið land, og har oyddi hann burtur ogn sína í einum óryggiligum levnaði. Men tá ið hann hevði forkomið øllum burtur, kom hørð hungursneyð um hetta sama land, og hann fór at líða neyð. Og hann fór til ein bónda har í landinum og helt seg aftrat honum, og hesin sendi hann út á mark sína at sita hjá svínum. Og hann vildi fegin fylla búk sín av tí dravi, stm svínini ótu; men eingin gav honum nakað. Tá gekk hann í seg sjálvan og segði: »Hvussu mangir bønarmenn hjá faðir mínum hava yvirflóð av mati, men eg doyggi her í hungri! Eg vil standa upp og fara til faðirs míns og siga við hann: »Faðir, eg havi syndað ímóti himlinum og ímóti tær; ikki eri eg longur verdur at eita sonur tín; lat meg sleppa at vera sum ein av bønarmonnum tínum«. Og hann reistist og tók at ganga til faðirs síns. Men meðan hann enn var langt burtur, sá faðir hansara hann og tókti stórliga synd í honum; og hann kom rennandi og hálsfevndi hann og kysti hann. Men sonurin seðgi við hann: »Faðir, eg havi syndað ímóti himlinum og ímóti tær; ikki eri eg longur verdur at eita sonur tín«. Men faðirin segði við húskallar sínar: »Farið eftir teimum bestu klæðunum og latið hann í tey; og setið ring á fingurin á honum og gevið honum skógvar upp á føturnar; og farið eftir góðingarkálvinum og drepið hann, og latum okkum eta og vera glaðar! Tí at hesin sonur mín var deyður og er livnaður aftur, hann var farin og er fingin aftur«. Og teir tóku at halda sær á gaman. Men hin eldri sonur hansara var úti á markini; og tá ið hann kom heim og nærkaðist húsunum, hoyrdi hann spæl og dans. Og hann rópaði ein av húskøllunum til sín og spurdi hann, hvat hetta hevði at týða. Men hann seðgi við hann: »Bróðir tín er komin, og faðir tín hevur dripið góðingarkálvin, av tí at hann hevur fingið hann heilan aftur«. Tá varð hann illur og vildi ikki fara inn. Faðir hansara fór tá út og bað hann. Men hann svaraði og segði við faðirin: »Sí, í so mong ár havi eg nú tænt tær og havi aldri gjørt ímóti boðum tínum; og mær hevur tú aldri givið so frægt sum eitt smálamb, so at eg kundi fáa mær ein stuttleika saman við vinum mínum! Men tá ið hasin sonur tín er heim aftur komin, sum hevur oytt burtur ognir tínar við skøkjum, nú drepur tú góðingarkálvin til hansara!« Men hann segði við hann: »Sonur mín, tú ert altíð hjá mær, og alt mitt er títt; men nú áttu vit at hildið okkum at gamni og at verið glaðir, tí at hesin bróðir tín var deyður og er livnaður aftur, var farin og er fingin aftur«.